# Triathlon landsliðið til OyL úttikið

**Føroya Triathlon Felag skipaði leygardagin fyri úttøkukapping til Oyggjaleikirnar á Isle of Man komandi summar. Veðrið var ikki av tí besta, men hetta foraði ikki føroysku triathletunum at gjøgnumføra drúgva teinin**

TÍÐINDASKRIV

Triathlon er ein ítróttargrein í er samansett av trimum greinum — svimjing, súkkling og renning. Kappast verður í fleiri teinum — Sprint Triathlon, OL-teinurin og Ironman. Tann kendasti er helst Ironman, sum eisini er tann harðasti. Her skal svimjast 4 km, súkkla 180 km og renna 42 km. OL-teinurin er fýra ferðir styttri og Sprint-teinurin átta ferðir styttri.

Triathlon verður við fyri fyrstu ferð í Oyggjaleika høpi, og tí er eitt triathlon felag sett á stovn. Felagið eitur Føroya Triathlon Felag og felagið skipaði leygardagin fyri úttøkukapping til Oyggjaleikirnar á Isle of Man komandi summar.

Á Isle of Man verður kappast í OL-teininum, ið er hesin samansettur av 1,5 km svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

Úttøkukappingin varð hildin í Havn, og svomið varð í Svimjihøllini í Gundadali. Luttakararnir skuldu har svimja 1500 metrar, og síðani skunda sær út á súkkluna. Leiðin gekk ímóti Kaldbak og súkklast skuldi nú 40 km. Vindurin var nógvur, tað regnaði og kølið var eisini. Hetta órógvaði triathletarnar og var eisini við til at gera teinin enn harðari. Súkklan bleiv parkerað við Plantusøluna og so varð farið undir renningina. Teinurin gekk frá Plantusøluni til nýggja bygningin hjá Føroya Sparikassa Yviri við Strond og aftur til Plantusøluna. Hesin teinur er fimm kilometrar og skuldi tí rennast tvær ferðir.

Ongin kravtíð er sett til føroysku triathletarnar eftirsum kappast ikki hevur verið í hesari ítróttargrein á Oyggjaleikum fyrr, og eftirsum veðrið ikki var av tí besta, ja so ber heldur ikki til at samanbera við tíðir frá øðrum kappingum, hvørki her heima ella uttanlanda.

Fýra mans og ein kvinna skulu mannað føroyska landsliðið, og hesi gjørdust:

| Navn | Tíð |
|---|---|
| Gunnar Dahl-Olsen | 2.30.50 |
| Evald Rasmussen | 2.34.04 |
| Beinir Rasmussen | 2.39.07 |
| Kári Simonsen | 2.59.26 |
| Helga Mikkelsen | 3.30.50 |
| Eli Christiansen | 2.46.01 |


*Helga Ellefsen skal í summar royna at verja føroysku litarnar á oyggjaleikunum*

VB–FSV 6–0 (5–0):

# Klassamunur í Vági

**Føroyameistararnir sópaðu allan iva til viks fyrstu minuttirnar, og restina av tíðini var spurningurin bert, hvussu stórur sigurin hjá VB skuldi verða**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í fjør segði stigatalvan sín greiða boðskap, tá greiðast skuldi frá muninum millum VB og FS Vágar. At kalla alt árið stríddust liðini í hvør sínum enda av stigatalvuni, hvør í sínum lag rukku tey eisini teimum málum, sum vórðu sett. VB við at gerast føroyameistarar, meðan vágamenn høvdu ein heldur varligari setning um at bjarga tilveruni í bestu deildini.

## Byrjaðu ógvusligt

Tí var kanska væntandi, at tað skuldi verða heimaliðið, sum vann tey trý stigini, og sigast kann ikki annað enn, at meistararnir eisini livdu upp til hetta álitið. Bert sjey minuttir tók tað teimum at avgera dystin. Tá hevði bólturin longu verið í vágamálinum tríggjar ferðir, og so var alt líka sum avgjørt.

Tað gingu bert tveir minuttir, áðrenn vágbingar fingu fyrsta gylta møguleikan at gera mál, tá beinini vórðu tikin undan Krzyztof Popczynski inni í brotsteiginum. Brotssparkinum tók venjarin sær av sjálvur, og so var 1-0.

Lítla løtu seinni var venjarin aftur upp á spæl. Magni Jacobsen legði ein bólt inn um verjuna hjá vágaliðnum, og einsamallur við málverjanum kundi Popczynski tvífalda leiðsluna hjá VB.


*VB venjarin, Krzyztof Popczynski, skeyt sjálvur tey bæði fyrstu málini móti FS Vágum sunnudagin*

Var vónin hjá gestunum ikki sløknað heilt eftir hesi bæði fyrstu málini, so mundi Predrag Zivkovic taka tað seinastu restina av henni, tá hann brádliga stóð ómarkeraður eftir eitt hornaspark.

Við trimum málum ímóti sær, ásannaðu vágamenn nú, at her gjørdist einki, og fyri áskoðararnar mann restin av dystinum ikki vera mest spennandi løtan, sum teir hava havt á Eiðinum. Fyri báðar partar ráddi bara um at fáa tíðina at ganga, umframt sjálvandi at hava eitt so skilagott úrslit við sær av vøllinum, sum gjørligt.

## Torført at meta

Áðrenn farið varð til steðgin, eydnaðist heimaliðnum at skjóta enn tvey mál. Fyrst skeyt Jón Pauli eitt sera vakurt av slagnum, tá hann avgreiddi hornasparksinnlegg í kassan, og løtu seinni var sami Jón Pauli aftur á staðnum, soleiðis at hann kundi avgreiða flata innleggið frá Predrag Zivkovic.

Seinna hálvleik var ikki annað enn væntandi, at ferðin á spælinumn var nakað væl lægri, enn hon hevði verið í fyrra. Heimaliðið hevði ikki fyri neyðini at spenna seg so nógv út, meðan gestirnir bara royndu at verja fyri, so talan ikki skuldi gerast um fleiri mál.

Tað kom tó enn eitt av slagnum, og hetta seinasta málið skeyt Robert Cieslewiczs. Sostatt gjørdist talan um ein sigur í tennis-tølum, men fyri liðini bæði sigur hetta úrslitið helst meira um FS Vágar enn um VB.

Í øllum førum kann roknast við, at vágamenn eins og í fjør oma at liva ein tilveru í botninum, og so er spurningurin, um teir megna at skava nóg nógv stig saman til at varveita sessin.

VB er verjandi meistari, og hetta ger sjálvandi, at krøv verða sett teimum í ár. Krøv, sum teir kanska ikki eru vanir við at hava. Hinvegin er tó heldur eingin loyna, at tað er rættilgia fá, sum hava VB sum fremsta evnið til gullmerkini hetta kappingarárið. Avrikini í steypakappingini hava verið msijøvn, og í so máta sigur sigurin á FSV ikki so nógv um styrkina hjá VB. Heldur varð bara við hesum sagt, at FSV hoyrir ikki til bólkin av feløgum, sum í ár fara at stríðast um heiðursmerkini í fremstu mansdeildini.

**VB-FS Vágar 6-0 (5-0)**

1-0: Krzystof Popczynski br.) 2
2-0: Krzystof Popczynski 5
3-0: Predrag Zivkovic 8
4-0: Jón Pauli Olsen 30
5-0: Jón Pauli Olsen 34
6-0: Robert Cieslewicz 60

Dómari: Oddmar Andreasen (HB)

VB: Bjarni Johansen, Predrag Zivkovic, Eyðn Jacobsen, Magni Jacobsen, Palli Augustinussen, Marek Wiersbicki, Jón Gærdbo, Tórður Holm, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewics, Krzyztof Popczynski



# Komandi landsliðstelvari

**Vinnarin av almenna bólkinum í ár í Vestmanna, Olaf Berg hevur av sonnum havt eitt dreymatalvár. Næsta ár skal hann royna seg í landsliðsbólkinum.**

TALVUNGDÓMUR
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

14 ára gamli havnardrongurin Olaf Berg hevur telvað sera væl síðani stóru GM kappingina í Tórshavn í oktober. Hann slapp tá at royna seg millum leyvirnar, og kláraði hann seg avbera væl. Á vinnandi liðnum úr Havnini í liðkappingini var Olaf álitið, og eisini toppskorari. Hetta gav honum helst nógmikið av sjálvsálitið, og fekk hann enn eitt gott úrslit, tá hann í Norðurlandameistaraheitinum fyri skúlaungdómar ognaði sær fyri aðru ferð eitt NM bronsumerki. Sjálvur var hann eitt sindur ónøgdur við úrslitið, hann ætlaði sær nevnliga at vinna, og er hetta júst rætti andin at førka seg víðari sum telvari.

## Krúnan á verkinum

Í vetur bleiv HT-open telvað, og suvirenur vinnari bleiv Olaf har hann eitt nú basti Martin Brekká og Herluf Hansen. Hesin stórsigur gav honum eisini fitt av rating, sum merkti at hann nú lá beint omanfyri 2000 markið.

Krúnan á verkinum bleiv FM í Vestmanna í ár. Hann var mettur favorittur saman við Terja Petersen og Herluf Hansen. Skjótt sást at kappingin um fyrsta pláss, og harvið atgongumerkið til landsliðsbólkin næsta ár, varð millum júst Olaf og Terja. Ein harður tvídystur. Olaf vann loksins bólkin við betri mótstøgustigum enn Terji, og tískil enn ein kappingarsigur til Olaf.


*14 ára gamli havnardrongurin, Olaf Berg, skal ætlandi royna seg í landsliðsbólkinum longu komandi kappingarár*

Tey seinastu árini hava serliga 17 ára gamli Martin Poulsen og Olaf, verið bestu unglingar okkara. Við hesum fylgir eisini ein stuttlig søga, tí tað hevur nevnliga víst seg at Olaf hevur nærum ár eftir ár trakkað í fótaspor Martins. Í 1998 bleiv Martin unglingaføroyameistari og árið eftir bleiv Olaf unglingaføroyameistari. Síðani vann Martin í fjør almenna bólkin, og sama gjørdi Olaf í ár. Martin royndi seg í ár í landsliðsbólkinum, men fekk harða viðferð, og endaði aftastur, og næsta ár fær Olaf sostatt møguleikan at royna seg saman við talvelituni.

## Ungdómstelving á dagsskránna

Í Talvsambandi Føroyar er ungdómstelving førkað fram sum høvuðsmál. Hetta er sjálvsagt gleðiligt, tí eingin ungdómur - eingin framtíð.

Í stuttum kann sigast at TSF fer at skipa fyri fleiri barnakappingum, eitt nú FM fyri børn og aðrar kappingar, har eisini roynt verður at fáa foreldur við í leikin. Okkara bestu ungdómar fáa møguleikan í HM og EM. Eisini verða venjarar settir til ymsar uppgávur, roynt verður at fáa talv inn í fólkaskúlar kring landið, og ein orðaður politikkur fyri barna- og ungdómstelving verður framdur. Ein serlig ungdómsnevnd fer at taka sær av hesum.

Tað hevur víst seg at føroyskur talvungdómur steðgar upp tá teir nærkast teimum átjan. Ov fáar kappingar heima og sanniliga altjóða eisini eru helst orsøkin til tess. Skipaðar venjingar hevur eisini manglað. Hetta fer vónandi at betrast nú ætlanin eitt nú er at senda umboð til HM og EM, og regluligar venjingar við sterkum telvarum eisini er ovast uppi á ynskilista TSF´s.

Hesar ætlanir eru als ikki bert fyri teir sterku unglingar, eisini óroyndur ungdómur sleppur í part.

Hesi endamál fara uttan iva at betra um umstøðurnar hjá eitt nú Olafi og øðrum, og styrkja teimum alsamt. Vit hava prógvað tað í NM at vit kunnu kappast við grannalond okkara.

LÍF-GÍ 3-0 (1-0):

# LÍF legði bragdliga fyri

**Eftir at teir í fjør nærum fluttu niður í fjrø, hevur LÍF um ikki annað sett hol á nýggja árið við einum sigri**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Í fjør hilnaðist tað illa hjá leirvíkingum. Í ár er Harry Benjaminsen venjari. Í 1998 og í 1999 hevði hann ábyrgdina, tá LÍF spældi um pláss í bestu deildini. Um fyrsta umfarið verður tikið sum metingargrundarlag, so tykist tað sum um LÍF aftur í ár ætlar sær at vera við í rætta endanum.

Leygardagin vitjaðu næstbestu gøtumenninir í Leirvík. Umstøðurnar hjá teimum vóru ikki tær bestu. At besta liðið, sum sunnudagin skuldi til Klaksvíkar, var illa mannað, gekk út yvir manningina á næstbesta liðnum. Samson Nesá var elsti maður, Jan Skoradal var aftastur, og Bárður Heinason hevur spælt nógv. Umframt hesar vóru nógvir ungir menn. Superveteranarnar sum t. d. Símun Petur Justinussen sást einki til. Kanska teir fara at koma, tá teir hava spælt seg eitt sindur í form í 4. deild!

Næstbestu gøtumenninir hava ofta spælt LÍF eitt puss. Men hesa ferð mistu teir allar møguleikar, tá eitt korter var farið. Tá varð Hildibjartur Joensen útvístur, tí hann í brotsteiginum hevði brúkt neyðbremsuna ímóti Jonhardi Høgnesen.

Tomek Rezel, verjukendi pólverski miðvallarin hjá LÍF, umsetti úr ellivu metrum, og harvið legði hann lunnar undir eitt stórt avrik. Tíggju minuttir út í 2. hálvleik økti hann til 2–0. Innskifti Fróði Joensen sendi innfyri úr høgru, aftasti maður hjá GÍ heilkiksaði, tá hann skuldi sparka burtur, og so var Tomek púra blankur.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki staðfesti Tomek hattrikkið. Eftir horna rakst bólturin aftur og fram í GI brotsteiginum, áðrenn miðvallarin stýrdi honum um strikuna.

Leirvíkingar høvdu nógv nýtt fólk. Allan Joensen, sum áður hevur spælt á Toftum og í Fuglafirði, var í málinum, Signar á Reynatrøð var veteranurin í miðverjuni, har Tórhallur Justinussen og Áslakur Jacobsen eisini vóru. Á miðvøllinum vóru saman við Tomek fleiri ungir menn: Hanus Lervig, Magnus Skoralíð, Steingrím Skoralíð og Óli Olsen. Í álopinum vóru Sigfríður Olsen og Jonhard Høgnesen. Umfram Fróða Joensen varð Ove Heinesen skiftur inn.

# Talvið hesa vikuna

Í samband við at Viktor Korchnoi fylti sjeyti ár herfyri, varð sterk kvikkaping telvað um vikuskifti í Sveis har Korchoi heldur til. Bæði Vladimir Kramnik og Gary Kasparov, sum jú kemur til føroyar í juni mánaða, vóru millum luttakarnar. Ikki óvæntað leiktu Kramnik og Kasparov seg leikandi lætt í finaluna, og varð tað ein kærkomin møguleiki hjá Kasparov at hevna HM-tapið til júst Kramnik. Men so varð ikki, Kramnik vann 1,5-0,5.

Fyrsta talvið endaði javnt, meðan talvið hesa vikuna er seinna talvið, sum Kramnik vann. Eitt sera vælleikt talv frá báðum síðum tá hugsað verður at teir bert høvdu 25 min. hvør til talvið.

Kramnik,V (2802) - Kasparov,G (2827)
Korchnoi Birthday KO Zurich SUI (finala), 29.04.2001
1.d4 Nf6 2.c4 e6 3.Nf3 d5 4.Nc3 dxc4 5.e3 a6 6.Bxc4 b5 7.Bd3 c5 8.a4 b4 9.Ne4 Nbd7 10.Nxf6+ Nxf6 11.0-0 Bb7 12.dxc5 Bxc5 13.Qe2 Qd5 14.Rd1 Qh5 15.h3 Rd8 16.Nd4 Qd5 17.Nf3 Ke7 [17...0-0?? 18.Bxh7+] 18.e4! (nu kemur rættiligt lív í eftir hendan ahugaverda leik) 18...Nxe4 19.Be3 Bxe3 20.Qxe3 Qc5 21.Qe1 Nf6 22.Rac1



Qb6 23.Ne5 Rd4
24.Bxa6! (Kramnik offrar sera djarvt og flott, men eisini er tað helst taktiskt eftirsum Kasparov her er í tíðaneyð) 24...Rxd1 25.Rxd1? [25.Qxd1 er einasti møguleiki ífylgju telduforritinum Fritz, men Kramnik er tó enn skutin framanfyri.] 25...Bxa6 26.Qxb4+ Qxb4 27.Nc6+ Kf8 28.Rd8+ (poengid vid offrinum, har Kramnik fyrst trýstur Kasparov heilt aftur, fyri síðani at taka frúgvuna aftur) Ne8 29.Nxb4 Flott telvad av Kramnik, har hann nu hevur fyrimun vid sinum aktiva folki, og frifinnum. Svartur er í sera trongum skóm. Sigast skal at báðir, serliga Kasparov, er í svárari tíðarneyð) 29...Be2 [29...Ke7 30.Nc6+ Kf6 31.b4 og finnurnar renna ov skjótt] 30.f3 h5 31.b3 (bispurin er fangaður) 31...Rh6 32.Kf2 Rg6 33.Kxe2 Rxg2+ 34.Kd3 Rg3 35.a5 Rxf3+ 36.Kc4 1-0

**Sig okkum frá**

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.



Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Sosialurin